## DAGSINS MEINING

# Avbjóðingar

Hóast løgmaður í nýggjársrøðu fegnaðist um, hvussu væl hevur gingið, nam hann eisini við avbjóðingar, ið standa fyri framman. Hann nevndi m.a. oljuvinnuna. Fóta vit okkum ikki rætt, er vandi á ferð. Vit skulu stýra nýggju oljuvinnuni og ikki øvugt var høvuðsboðskapurin.

Rætt ger løgmaður at leggja stóran dent á hetta mál. Tí talan er um eina ótrúliga stóra avbjóðing fyri føroyska samfelagið. Henda vinna fer neyvan bafa at hava nakað gott við sær. Vandi er í hvørjari vælferð. Slíkur er tann ávirkan oljuvinnan fær á lønarlagið. Hvør fer við fiskiskipi ella at arbeiða á flakavirki, tá og um nógv hægri lønir eru í oljuvinnuni og boð eru eftir fólki! Hvussu verður við mentanina, nú kanska útlendingar í stórum tali koma til landið! Hvussu við málinum osfr.

Tað er rætt av løgmanni at reisa hesar spurningar. Tað vísir, at landsins hægsti maður er varugur við umrøddu vandar, sum lúra í kjalarvørrinum á oljuvælferðini. Men her er tað kanska eisini ein fyrimunur at vera eitt lítið og lutvíst væl útbygt samfelag, tí samskiftið og harvið tíðin og leiðin til at varnast vandarnar, umrøða teir og taka skilagóðar avgerðir um teir, er stytri enn í stórum londum. Eftir røðu løgmans stendur umrødda mál meira frammaliga í hugaheimi okkara. Vit verða líkasum longu nú drigin uppí umrøðuna og viðgerðina - uppí dialogin. Og soleiðis skal eitt demokrati virka.

Sjálvandi skulu vit stýra hesi vinnu og ikki øvugt sum løgmaður vísir á. Men vit mugu gera tað við skynsemi og dugnaskapi. Vandi er eisini á ferð, um serstakar serføroyskar loysnir skulu finnast fyri eitt og alt. Hóast oljuvinnan er stór og nýggj, so er hon ein vinna sum allar aðrar. Hon verður rikin eftir handilsligum treytum, og tað er nakað, sum eisini vit mugu taka til eftirtektar. Nú hava vit eins og íslendingar dugað at ment fiskivinnuna uttan almennan stuðul ol. Hetta er nakað, sum umheimurin kann læra av, eins og sending í BBC nú um dagarnar so greitt vísti. Hon snúði seg um, hvussu Ísland megnar at umsita fiskiríkidømi sítt við eini vinnu, sum ikki fær studning. Taka vit oljuvinnuna, hava vit heilt givið nakað av læra av henni: at menna okkara egna førleika, at læra av øðrum at vera kappingarførir í bæði prísi og dygd.

Vit eiga at taka orð løgmans um avbjóðingarnar í oljuvinnuni í størsta álvara. Og tað er tí eisini við stórum áhuga at bíðað verður eftir tí kanning, sum Fróðskaparsetur Føroyar og bretska fyritøkan Menas gera um avleiðingarnar, sum oljuvinnan fer at hava á føroyska samfelagið.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Dimma ein blaðstjóra



Georg L. Petersen er nú einsamallur blaðstjóri á Dimmalætting. Hetta hevur nevndin fyri Dimmalætting gjørt av, eftir at Beata L. Samuelsen varð vald í Tórshavnar býráð í november umboðandi Sambandsflokkin.

Beate L. Samuelsen gjørdist ábyrgdarblaðstjóri, tá Benny L. Samuelsen legði frá sær í 1995, og tá gjørdist Georg L. Petersen blaðstjóri.

Blaðstjórastarvið hevur verið í Samuelsen-familjuni í útvið 70 ár, tí longu tíðliga í 30'unum gjørdist pápi Beate og abbi núverandi blaðstjóran, Georg L. Samuelsen, blaðstjóri. Hann røkti hetta starvið líka fram í áttatiárini.

Beate L. Samuelsen hevur farloyvi frá ábyrgdarblaðstjórastarvinum, nú hon er farin upp í politikk. Hon verður í staðin vanligt tíðindafólk við serligum uppgávum, eitt nú at standa fyri tí innsenda tilfarinum, sum hon eisini hevur gjørt higartil.

– Umframt at hon í størri mun fer at takast við vanligan tíðindaflutning, tó ikki slíkan, sum hevur beinleiðis samband við tað, hon tekst við í sínum politiska lívi, segði Georg L. Petersen við Dimmalætting nú um dagarnar.

Í framtíðini verður tað so Georg L. Petersen, sum fer at skriva oddagreinarnar - og har fara vit at merkja broytingar, sigur hann. Hann lovar, at hann fer at vera meira kritiskur móti Danmark - men eisini móti fullveldinum. Hann ætlar, at oddagreinarnar í Dimmalætting skulu vera ein aktivur partur av kjakinum upp til fólkaatkvøðuna, og hann sær tað sum eitt mál, at gera sítt til, at úrslitið av fólkaatkvøðuni um fullveldi verður eitt nei.

## Ein nýggjárs heilsan

Mítt kæra oyggjaland
og alt tað fólk har býr
standi saman um hettar land,
so náa vit á mál har frælsi býr.

Afturhaldið roynir at dyrgja
at fjøldin er slept uppá fjall,
og okkum ei kunnu forsyrgja
at fylla í okkara hjall.

Her búgva kvinnur og menn
sum tora at taka eina støðu,
og bróta upp um armar og royna enn,
at Føroyar skulu blíva sjálvstøðugar.

Kósin er sett, fara hjálandaveldið,
nú fara vit inn í nýtt ára skeið,
har taka vit stigið, at vit eiga valdið,
og tjóðin er føroysk, og fer sína leið.

Gott nýggjár øll somul

*Heilsan Ólavur í Trøðini*
*umborð á M/S Delphinus tann 27.12.00*

## Tøkk



*Okkara hjartans tøkk senda vit tykkum øllum kring landið, sum á ymsan hátt gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum 21. oktober.*

*Eina serliga tøkk bera vit ætt og vinum og tí stóru samkomu, sum vitjaðu okkum í Ebenezer og gjørdu dagin so ógloymandi fyri okkum.*

*Vit eru Harranum sera takksom fyri hesi mongu ár, vit fingu loyvi at liva saman við ætt og vinum í hesum góða landi, sum Hann hevur signað so ríkiliga bæði tímiliga og andaliga.*

*Vit senda øllum okkara bestu nýggjársynski við bøn um, at Harrin framvegis skal signa fólkið, sum her býr.*

***Judith og Osvald Kjærbo***

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust meg á 95 ára degnum 24.12.2000, takki eg hjartaliga. Gott nýggjár.

*Heilsan*
**Anna Stenberg, Sandvík**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




Kristian Magnussen, løgtingsmaður:

# Rættartrygdin hjá fólki í vanda

**– Eftir øllum at døma hava kommunurnar fingið lovað, at tær fáa eitt ávíst rásarúm sjálvar at gera av, hvør hevur uppiborið fríplásss og hvør ikki hevur, tá ið tær yvirtaka økið, sigur Kristian Magnussen**

FRÍPLÁSS
*Turið Kjølbro*



*Yvirtaka kommunurnar ábyrgdina og útreiðslurnar av fríplássum, er vandi fyri, at øll ikki vera líka fyri lógini, metir Kristian Magnussen, løgtingsmaður og limur í Trivnaðarnevndini. Formaðurin í Kommunufelagnum, Jógvan K. Mørkøre, metir hinvegin, at við yvirtøkuni fer at bera til at nokta fólki frípláss, sum undir verandi skipan fáa játtað eitt slíkt, men sum ikki hava uppiborið tað*

*Tilvildarliga vald mynd*

Í løtuni liggur lógaruppskot í Trivnaðarnevndini um at leggja ábyrgdina og útreiðslurnar av fríplássum út til kommunurnar at umsita. Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum, legði uppskotið fyri tingið í desember. Talan er um løgtingslóg um broyting í lóg um barnaforsorg. Lógin skuldi eftir ætlan koma í gildi 1. januar, men enn er hon ikki avgreidd.

Um somu tíð sum nýggj barnagarðslóg kom í gildi seinasta summar, yvirtóku kommunurnar kostnaðin av at reka barnagarðar og dagrøkt. Síðani er samgongan vorðin samd um, at kommunurnar eisini skulu bera kostnaðin av teimum fíggjarligu fríplássunum. Í barnaforsorgarlógini verður tosað um sosial, pedagogisk og fíggjarlig frípláss. Tey sosialu og pedagogisku fríplássini skal landskassin framvegis rinda eftir uppskotinum.

### Lógloysi

Tað skulu framvegis vera barnaverndirnar, sum skulu taka støðu til, hvørt frípláss verður játtað, men í mun til í dag, eru tað kommunurnar, sum skulu gjalda fyri tey fíggjarligu fríplássini. Hetta merkir, at játtanarmyndugleikin verður tann sami sum higartil, landskassin rindar framvegis fyri tey sosialu og pedagogisku fríplássini, meðan kommunurnar rinda tey fíggjarligu fríplássini. Tað skal tó sigast, at tey flestu fríplássini, sum eru úti um landið í dag, eru fíggjarlig frípláss.

Kristian Magnussen, løgtingsmaður og limur í Trivnaðarnevndini, tekur als ikki undir við, at kommunurnar yvirtaka umsitingina og útreiðslurnar av fríplássum.

– Eg stúri fyri, hvat fer at henda úti um landið, um kommunurnar skulu umsita fríplássini. Smáu kommunurnar verða noyddar at fáa eina umsiting upp at standa, sum skal taka sær av fríplássunum og so kunnu tær í hvørjum einstøkum føri fara inn og kanna umsøkjararnar til frípláss. Hvørji foreldur liva saman og hvørji ikki. Eftir øllum at døma hava tær fingið lovað, at tær fáa eitt ávíst rásarúm sjálvar at gera av, hvør hevur uppiborið frípláss og hvør ikki hevur. Sostatt verða øll ikki líka fyri lógini. Hetta setur rættartrygdina hjá fólki í stóran vanda. Vit fara at fáa ymiskar standardir í teim ymsu kommununum og tað kann føra við sær, at fólk fara at flyta ímillum kommunur, sigur Kristian Magnussen.

Løgtingsmaðurin heldur tað vera ein óskikkur at koma við broytingum sum hesum so seint á árinum, eftir at allar kommunurnar hava lagt fíggjarætlanirnar fyri komandi árið. Tí uppskotið fer at føra við sær, at kommunur fáa meirútreiðslur. Í uppskotinum sæst, at samlað fer broytingin at kosta kommununum slakar 5 mió. krónur. Harav verður mett, at Tórshavnar kommuna eigur helmingin.

– Tað letur til, at uppgávur verða bara tilvildarliga tveittar út til kommunurnar at umsita. Fyrst varð barnaansingarøkið lagt út, har tær kommunur, sum høvdu raðfest økið, vórðu revsaðar, síðani kom skattalættin eftir at fíggjarætlanirnar hjá kommununum vórðu samtyktar, og nú skulu fríplássini leggjast út, sigur Kristian Magnussen.

### Ov nógv brúkt

Formaðurin í Kommunufelagnum, Jógvan K. Mørkøre, er samdur við Kristiani Magnussen í, at tað er ein óskikkur at áleggja kommununum so stórar og umfatandi broytingar so seint á árinum. Men í mun til løgtingsmannin heldur Jógvan K. Mørkøre, at kommunurnar betur eru førar fyri til at umsita fríplássini enn landið. Og ikki minst kunnu tryggja, at bert tey, ið av røttum eiga at fáa frípláss, fáa játtað eitt slíkt.

Her sipar fomaðurin í kommunufelagnum til fólk, sum á skattalistanum standa fyri ikki at hava vunnið eina krónu, men sum fáa góða inntøku úr útlandinum, umframt foreldur, sum ikki eru gift, har inntøkan hjá eina foreldrinum er so mikið lág, at hon lúkar treytirnar fyri at fáa frípláss.

– Frípláss skulu játtast til fólk sum hava tað fyri neyðuni. Óneyðuga nógvur peningur fer á skeivar hendur. Uttan mun til, um tað er landið ella kommunurnar, sum skulu gjalda fríplássini, er upphæddin, sum verður brúkt til endamálið, alt ov stór. Skulu kommunurnar yvirtaka hesa uppgávuna, eiga tær eisini at hava ávirkan á økið. Eitt nú kann tað hugsast, at grundarlagið, sum frípláss verða roknað eftir, verður broytt, tí sambært tí verandi verða frípláss játtað um ein hevur eina vanliga arbeiðsmannainntøka, sigur Jógvan K. Mørkøre.

Formaðurin í kommunufelagnum ræðist ikki tankan, at einstøku kommunurnar skulu inn í hvørja einstaka familju at kanna, um viðurskiftini nú eru soleiðis, sum tey síggja út á pappírinum.

– Hetta eru viðurskifti kommunurnar vita av kortini. Í dag er sambært lóg ikki loyvt, at bert inntøkan hjá tí eina foreldrinum er grundarlag fyri fríplássi. Óskilið er so mikið stórt á hesum øki, at henda broytingin fer bara at gera viðurskiftini betri, sigur hann.

Hava foreldur inntøku yvir 202.000 kr. verður frípláss ikki játtað. Inntøka á 170.000 kr. fær játtað 75 % av einum fríplássi, meðan inntøkur á 157.000 kr. og minni fáa fult frípláss.

# Børn komin í Kjalarlon

**Bíðilistin til stovnspláss í Klaksvík minkar í hesum døgum við 48 børnum, nú nýggi dagstovnurin Kjalarlon er latin upp. Eftir á bíðilistanum standa 278 børn**

BARNAGARÐUR
*Turið Kjølbro*

Lív er komið í nýggja barnagarðin í Klaksvík. Týsdagin komu 24 børn inn um gátt á stovninum fyri fyrstu ferð og hálvan januar byrja 24 børn afturat. Stovnurin er nomineraður til 60 børn, men helst verða fleiri ikki tikin inn í fyrsta umfari.

– Kjallarin er stórur og møguleiki er fyri at gera eina spælistovu til dagrøktarbørn. Fyrr enn vit taka støðu til tað og hvat annars skal henda á økinum, skal ein heildarætlan gerast yvir alt barnaansingarøkið í kommununi, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð.



*Fyrr enn alt barnaansingarøkið er endurskoðað, verður eingin avgerð tikin um, nær og hvar næsti dagstovnurin kemur, sigur Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd í Klaksvíkar býráð*

Nýggi stovnurin liggur við Kjalarvegin og hevur fingið hóskandi navnið Kjalarlon. Hvussu nógv hann kostar er endaliga ikki gjørt upp. Leiðari á stovninum er Eydna Fredriksberg. Afturat sær hevur hon 13 starvsfólk.

### Framgongd

Síðani Klaksvíkar býráð fekk barnaansingarøkið at umsita, er rættilig ferð komin á útbyggingarnar av stovnsplássum.

– Tað tók tvey ár at lata dagstovnin Mylnuhúsið upp, tí landsmyndugleikarnir skuldu alla tíðina vera inni í myndini og vit ikki sjálv kundu gera av, hvat skuldi henda. Nú kunnu vit byggja út nógv skjótari, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Peningur er settur av á fíggjarlógini fyri árið, ið júst er byrjað, til enn fleiri stovnspláss. Umboð fyri kommununa hava verið úti um seg og hugt eftir húsum, sum kunnu gerast um til dagstovn.

– Fyrr enn alt økið er endurskoðað, verður eingin avgerð tikin um, nær og hvar næsti dagstovnurin kemur. Nógv fólk eru flutt til Klaksvíkar, nógv arbeiði er og tí veksur bíðlistin til stovnspláss eisini. Tað er bara positivt. Vit kunnu ikki gera annað enn at fylgja við. Helst gongur ikki long tíð fyrr enn næsti stovnur letur upp, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Bíðilistin er í løtuni 278 børn.

– Í dag eru 327 á dagstovni og í dagrøkt í kommununi. Bíðilistin umfatar eisini tey 120 børnini, sum hava dagrøktarpláss. Tey ynskja øll stovnspláss, sigur Jórun Niclasen, samskipari á barnaansingarøkinum í Klaksvíkar býráð.

Tríggir barnagarðar eru í dag í Klaksvík, Drotning Margretu barnagarður, Mylnuhúsið og Kjalarlon.